betri DEILDIN

# LEIKSKRÁ

8. apríl 2023

SKRÁ NR. 3

HANS JÁKUP J. LERVIG NR.12




2008 VÍKINGUR

# 5. UMFAR

# HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo




# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD


Dysturin í dag

Støðan í Betri deildini

TEAM ÍF

TEAM Víkingur

Dómarar

Meginreglur í ungdómsdeildini

Toppskjúttar eftir 2 umfør

Søgubrot 3

ÍF-sangurin




INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



BIRGIR PETERSEN

# DYSTURIN Í DAG

Vælkomin til dyst í Betri-deildini. Seinasta umfar fingu vit gongd á málskjótingina og fingu fulla úrtøku móti AB í góðveðrinum í Fløtugerð seinasta sunnudag. Hans Jákup gjørdi bart og langaði bóltin í kassan tvær reisur, og tá okkara verja helt tætt, so má sigast at tá er ikki so nógv at finnast at. Okkara lið sær eisini út til at vera væl skipa og samanspælt, allir draga somu línu, sum man plagar siga. Teir ungu leikarnir vístu eisini góðan hugburð og pressaðu mótstøðuna á skynsaman hátt í allarflestu førunum.

Í dag taka vit ímóti Víkingi, sum sementeraðu sína støðu sum lið í sterkaru helvtini við at smyrja aldurs-forsetan av Tvøroyri heili 7-0 í Sarpugerði. Hetta var sikkurt eisini tiltronkt, tí teir komu illa frá fyrsta umfarinum, har B36 góvu teinum turt uppá við greiðum 3-0 sigri, og enntá í Gøtu.

Hvussu tað fer at ganga í dag er ringt at siga, men seinast vit spældu móti Víkingi var í fyrstu deild, og er tað  ikki neyðugt at pensla út her, hvussu tað gekk. Um tað verður, sum tað var áðrenn vit fluttu niður, so eru vit við at koyra Føroya allarbesta „lokaderby" í gongd aftur. Tvs. at tað koma minst 3 mál og ongin sparir seg uppá nakran máta, soleiðis hevur gingið óansæð um vit ella teir hava verið frammanfyri á stigatalvuni.

**Góðan dyst øll somul.**
**Koyri á drongir**

**BÓLTASTUÐUL:**
Basalt Grótlaðing






VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

# EFTIR 2 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 8 | 1 | +7 | 6 |
| 2 | HB | 2 | 2 | 0 | 0 | 6 | 1 | +5 | 6 |
| 3 | 07 Vestur | 2 | 1 | 1 | 0 | 2 | 1 | +1 | 4 |
| 4 | Víkingur | 2 | 1 | 0 | 1 | 7 | 3 | +4 | 3 |
| 5 | B36 | 2 | 1 | 0 | 1 | 3 | 2 | +1 | 3 |
| 6 | EB/Streymur | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 1 | +1 | 3 |
| 7 | ÍF | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 1 | +1 | 3 |
| 8 | B68 | 2 | 0 | 1 | 1 | 2 | 5 | -3 | 1 |
| 9 | AB | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 4 | -4 | 0 |
| 10 | TB | 2 | 0 | 0 | 2 | 1 | 14 | -13 | 0 |

WWW.DYSTIR.FO

## 5. UMFAR

| | |
|---|---|
| 08.04.23 | B36 - B68 |
| 08.04.23 | EB/Streymur - TB |
| 08.04.23 | HB - AB |
| 08.04.23 | 07 Vestur - KÍ |
| 08.04.23 | ÍF - Víkingur |

## 2. UMFAR

| | |
|---|---|
| 12.04.23 | ÍF - EB/Streymur |
| 12.04.23 | AB - KÍ |
| 12.04.23 | B36 - 07 Vestur |
| 12.04.23 | TB - HB |
| 12.04.23 | B68 - Víkingur |

# KES.FO

HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE

Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.

Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.




INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | |
|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 |
| Elvio **Gelmini** | 2 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 |
| Tóri **N. Olsen** | 4 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 |
| Karl **A. Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 8 |
| Jhon Edy **Mena** | 9 |
| Jóhan **Petersen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Hans Jákup **J. Lervig** | 12 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 |
| Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Líggjas **Heðinsson** | 16 |
| Jóhann **Højbro** | 17 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Aron **Kensson** | 20 |
| Rógvi **Matras** | 21 |
| Elias **Lervig** | 22 |
| Hans **Jacobsen** | 23 |
| Gonzalo **Zárate** | 24 |
| Bergur **Jacobsen** | 25 |
| Sámal **Zachariassen** | 34 |

| | |
|---|---|
| Høvuðsvenjari: | Aleksandar Jovevic |
| Hjálparvenjari: | Bartal Eliasen |
| Málmansvenjari: | Erling Joensen |
| Fysiskur venjari: | Gudmundur Danielsen |
| Fysioterapeutur: | Jónfríð Hansen |
| Liðleiðari: | Rói D. Olsen |
| Liðleiðari: | Heðin L. Olsen |
| Liðleiðari: | Fríði R. Petersen |

**INNIHALD**

2008
VÍKINGUR

| | |
|---|---|
| Bárður **á Reynatrøð** | 1 |
| Andreas **Lava Olsen** | 2 |
| Signar **á Brúnni** | 3 |
| Atli **Gregersen** | 4 |
| Jákup **Johansen** | 7 |
| Bergur **Gregersen** | 8 |
| Martin **Klein Joensen** | 9 |
| Sølvi **Vatnhamar** | 10 |
| Olaf **Bárðarson** | 11 |
| Ingi **Jonhardsson** | 14 |
| Géza Dávid **Turi** | 15 |
| Finnur **Justinussen** | 17 |
| Arnbjørn **Svensson** | 18 |
| Aron **J. Ellingsgaard** | 19 |
| Ari **Olsen** | 22 |
| Hans J. **Arngrímsson** | 25 |
| Poul **Kallsberg** | 27 |
| Árni Nóa **Atlason** | 30 |

Høvuðsvenjari: **Jóhan Petur Poulsen**
Hjálparvenjari: **Ólavur Mikkelsen**

**INNIHALD**

DÓMARI

Jóhan Hendrik **Ellefsen**

1. HJÁLPARDÓMARI

Jan **Hermansen**

2. HJÁLPARDÓMARI

Jógvan **Klakkstein**

4. DÓMARI

Alex **Troleis**

DÓMARAEYGLEIÐARI

Georg **Nolsøe Rasmussen**

magn




Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60

# Meginreglur í ungdómsdeildini

JÓAN PAULI JACOBSEN

**Tað besta, sum er hent hjá ÍF seinnu árini, er, at kvinnurnar eru komnar aftur til Fuglafjarðar at spæla fótbólt, tí tær venja, døma, sita í nevndum og taka annars lut í felagslívinum á allan hátt.**

Nevndirnar eru mannaðar, vit hava fingið fíggjarligt støðufesti og kommunan er ein góður viðleikari.

Vit, sum varða av ungdómsdeildini, ynskja, at teir ungu fuglfirðingarnir fáa eitt gott tilboð alt árið, tískil er nærum ongin steðgur í venjingini hjá ÍF; hvørki um summarið ella um veturin. Ungir fuglfirðingar kunnu eisini venja ofta og venja longri hvørja ferð. Tað eru ongi skott millum liðini, so leikararnir kunnu venja við eldri/yngri liðum. Hugsjónin er, at vit arbeiða við 25%-50%-25%, har leikararnir helvtina av tíðini fáa venjing á hóskandi støði, har teir 25% eru trýstir og 25% eru millum teir bestu.

Hann vinnur, ið treiskur er, byggir á meginregluna um 10.000 tímar við fótbólti í 10 ár. Kókað niður til vikur, so

tosa vit um 20-25 tímar við fótbólti hvørja viku. Tá er eisini týdningarmikið at hava í huga, at alt telur: spæl í fríkorterinum, ítróttur í skúlanum, sjálvvenjing á vøllinum, venjing við felagnum osfr. Aðrar kanningar vísa á, at tað krevur 600.000 endurtøkur fyri at betra um ymiskar bólteginleikar, tískil ynskja vit eisini 1.000 bóltnertingar hvørja venjing.




Teir flestu leikararnir, sum náa fótbóltstindin, byrjaðu tíðliga at spæla fótbólt, tí hava vit eisini eitt tilboð til tey allaryngstu, kallað Yngst ella U5. Skulu hesi ungu síðani halda á flest møguligt-longst møguligt-best møguligt, noyðast vit sum felag at hugsa vinfólk og felagsskap frammarlaga í virkseminum.

Men fótbóltsspæl er ikki bert við bólti, men eigur hvør einstakur leikari at hugsa um kroppin og hvørja áfylling kroppurin fær. Matur og fimi eiga sostatt at hava høga raðfesting bæði hjá íðkarum og foreldrum, sum kunnu stuðla við góðum matpakkum ella góðum ráðum.

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT løggildir grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 4 |
| 2 | Mikkel **Dahl** (HB) | 2 |
| 3 | Hans Jákup **J. Lervig** (ÍF) | 2 |
| 4 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 2 |
| 5 | Daniel **Obbekjær** (07 Vestur) | 1 |
| 6 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 1 |
| 7 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 1 |
| 8 | Magnus **Egilsson** (B36) | 1 |
| 9 | Taufee **Skandari** (B36) | 1 |
| 10 | Ragnar **Samuelsen** (B68) | 1 |

WWW.DYSTUR.FO

SØGUBROT 3

# Vegurin frá **Fuglafjarðar Ítróttarfelag/FÍ** til **Ítróttarfelag Fuglafjarðar/ÍF**

EFTIR: PETUR S. SIMONSEN

**Í Søgubrotið 2 varð víst á, at navnið „Ítróttarfelag Fuglafjarðar“ longu stendur í gerðabókini hjá Fuglafjarðar kommunu í februar 1941. Hetta kemst av, at felagið hevur søkt „um árligan studning til eina fótbóltsplenu“. Og árið eftir er aftur umsókn frá „Ítróttarfelag Fuglafjarðar“.**

Niðurstøðan í Søgubrotið 2 er, at „Ítróttarfelag Fuglafjarðar“ helst er tað navnið, sum hevur verið brúkt í samskifti og manna millum í fyrru helvt av 1940'unum, og ikki „Fuglafjarðar bóltfelag“, sum er navnið á felagnum, sum varð stovnað 9. februar 1938.

**Fuglafjarðar Ítróttafelag stovnað**
Tann 25. mars 1946 verður „Fuglafjarðar Ítróttafelag“ stovnað.

Elsta gerðabókin hjá felagnum, eg havi atgongd til, er frá 1955, og fyrsti fundurin er dagfestur 31. august hetta árið.

Í frágreiðingin frá fundinum stendur m.a., at „nevndin fyri Fuglafjarðar Ítróttafelag kom saman til fundar. Allir limir møttir.“

Síðani minnir Herluf Berthelsen, sum tá var formaður, á „Lóg fyri Fuglafjarðar Ítróttafelag“.

Øll lógin, sum hevur 10 greinar, verður síðani endurgivin í gerðabókini. Um hetta er tann upprunaliga útgávan – tann frá 1946 – ber ikki til at siga, men ivaleyst er hon á leið tann sama.

Vit skulu ikki endurgeva lógina fyri felagið her, men bert taka grein 1 burturúr.

**Grein 1 ljóðar soleiðis:** *„Felagið eitur Fuglafjarðar Ítróttafelag, tað er stovnað 25. mars 1946 og hevur heimstað í Fuglafirði."*




*Nevndin, sum varð vald, tá Fuglafjarðar Ítróttafelag varð stovnað 25. mars 1946, og sum sat til 1958.*

Myndin er lænt úr myndasavni, sum Signar á Brúnni hevur savnað

Ivaleyst er tað av málsligum orsøkum, at navnið á felagnum er „Fuglafjarðar Ítróttafelag" og ikki „Ítróttafelag Fuglafjarðar". Og uttan iva hevur Herluf Berthelsen,

sum var málkønur lærari, sín lut í hesum. Men stutt-stavað, verður „Fuglafjarðar Ítróttafelag“ til „FÍ“. Og tað er ikki tað mest sjálvsagda navnið at siga í dagligari talu og enn minni í einari spentari støðu á vøllinum!

## ÍF og Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Í gerðabókini frá 1955 til 1958, verður hvørja ferð skrivað: “.. kom nevndin fyri Fuglafjarðar Ítróttafelag saman til fundar”.



Ár 1955 tann 31. august kom
nevndin fyri Fuglafjarðar ítróttafelag
saman til fundar. Allir limir møttir.
Formaðurin minti á

Lóg
fyri
Fuglafjarðar Ítróttafelag

1.
Felagið eitur Fuglafjarðar Ítróttafelag,
tað er stovnað tann 25. mars 1946 og
hevur heimstað í Fuglafirði.

2.
Felagið virkar fyri góðari ítrótt í
bygdini, vil eftir førimuni skapa
bestu ~~møguleikar~~ líkindi fyri ítróttini
og roynir at ala fram góðan felags-
anda millum limir tess.

3.
Felagið stendur sum limur í
Ítróttasambandi Føroya.

4.
Limir
Hvør sámulig kvinna og hvør

*Gerðabókin 1955, síða 1. Lóg fyri Fuglafjarðar Ítróttafelag, sum varð stovnað 25. mars 1946.*

Men tá tað í gerðabókini tann 15. desember 1957 verður greitt frá eini *„.. innbjóðing frá Gomlum bóltspælarum í Fuglafirði til fótbóltskapping um silvursteyp millum fótbóltsliðini í Leirvík, Gøtu, Eiði og Fuglafirði “*, verður „Fuglafjarðar Ítróttafelag“ í kappingaryvirlitinum stuttstavað sum „Í.F.“

Í august 1958 kemur innbjóðing frá keypmonnum í Nes sókn um eina ferðasteypakapping millum hondbóltsliðini (kvinnur) í Stranda Ítróttarfelag, Tjaldrinum og „Ítróttarfelag Fuglafjarðar“.

Og í yvirlitinum hjá Ítróttasambandi Føroya í 1948 yvir ítróttafeløg verður felagið úr Fuglafirði nevnt „Ítróttafelag Fuglafjarðar“.



ÍTRÓTTASAMBAND FØROYA

Í Ítróttasambandi Føroya eru hesi feløg:

| | |
|---|---|
| B. 36 | Tórshavn |
| Boxifelagið »Tór« | — |
| Bóltfelagið »Royn« | Hvalbøur |
| Eiðis Bóltfelag | Eiði |
| Fámjinar Bóltfelag | Fámjin |
| Felagið »Kappróður« | Tórshavn |
| Havnar Bóltfelag | — |
| Havnar Fimleikarfelag | — |
| Havnar Tennisfelag | — |
| Hondbóltsfelagið »Neistin« | — |
| Hondbóltsfelagið »Vípan« | Sandur |
| Ítróttafelag Fuglafjarðar | Fuglafjørður |
| Ítrótta- og Ungmannafelagið »Ternan« | Viðareiði |
| Klakksvíkar Ítróttafelag | Klakksvík |
| Kollafjarðar Ítróttafelag | Kollafjørður |
| Lorvíkar Bóltfelag | Lorvík |
| Miðvágs Ítróttafelag | Miðvágur |
| Gøtu Ítróttafelag | Norðragøta |
| Sandavágs Ítróttafelag | Sandavágur |
| Ítróttafelagið »Tjaldur« | Sandur |
| Sandvíkar Bóltfelag | Sandvík |
| Sunnbiar Bóltfelag | Sunnbøur |
| Sørvágs Ítróttafelag | Sørvágur |
| Stranda Ítróttafelag | Strendur |
| Skálavíkar Ítróttafelag | Skálavík |
| Tvøroyrar Bóltfelag | Tvøroyri |
| Vágs Bóltfelag | Vágur |
| Vestmanna Ítróttafelag | Vestmanna |
| Trongisvágs Bóltfelag | Trongisvágur |
| Øravíkar Bóltfelag | Øravík |
| Føroya Ríðingafelag | Tórshavn |
| Hondbóltsfelagið »Báran« | Hvalvík |
| Klakksvíkar Fimleikarfelag | Klakksvík |

*Yvirlit yvir feløg í Ítróttasambandi Føroya í 1948.*

*Her er felagið nevnt “Ítróttafelag Fuglafjarðar”.*



*ÍF-flaggið frá 1959. Onkuntíð nevnt „Dýnan".*

Hesi dømi vísa, at sjálvt um formliga navnið er „Fuglafjarðar Ítróttafelag", so verður „ÍF" ella „Ítróttafelag Fuglafjarðar" brúkt í sambandi við kappingar og av feløgum og felagsskapum hesi árini.

Teir, sum skriva undir hesi árini, eru: Herluf Bertelsen, formaður, Obert Eliasen, Poul Jacob Hansen og Sofus Eliasen, allir stovnarar av felagnum, og so Esman Jacobsen. – Martin Johannesen var í nevndini, sum varð vald í 1946. Men hann var sjómaður og ivaleyst so nógv burtur, at Esman Jacobsen er komin í hansara stað.

**TRÝST HER FYRI AT LESA ALLA GREININA**

NÝRÙM

Teknistova
einar@nyrum.fo
tlf 78 88 99



BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

TAKK FYRI STUÐULIN

# Leiðandi reiðarí í norðurhøvum




VARÐIN

P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

OKKARA KJARNUØKI

**GRANNSKOÐAN**
ROKNSKAPARHJÁLP
**SKATTUR**
VIRKISRÁÐGEVING
**BÓKHALD**
MEIRVIRÐISGJALD

Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.



Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**